

# Sjóborg heldur fram hjá Statoil

Deil:



**Jan Müller**

26.09.2014 - 11:06

Oljan.fo

*Tað gjørdist ikki nógv hvíld hjá manningini á Skansi-farinum Sjóborg á hesum sinni, og gott tað sama. Sambært spotlistunum hjá meklarafyritøkunum hevur Statoil tryggjað sær víðari tænastur frá Sjoborg.*

*Jens Meinhard Rasmussen, stjóri í Skansi Offshore váttar fyri oljan.fo, at avtala er gjørd við Statoil dag fyri dag, upp til 21 dagar.*

*Í Norðsjógvinum velja nógv oljufeløg at dekka ein stóran part av teirra tørvi við skipum úr spotmarknaðinum. Sáttmálar, sum eru longri enn 45 dagar, verða vanliga nevndir langtíðarsáttmálar.*

*»Eldborg», sum hevur arbeitt fyri Statoil Tanzania, verður væntandi eisini at síggja í spotmarknaðinum í  Norðsjónum. Skipið hevur arbeitt í Tanzania og Mozambique, men er nú ávegis til Norðsjógvin aftur.*

*Hini trý skipini hjá reiðarínum hava øll longri sáttmálar. Saeborg og Tórsborg fram til 2018, meðan sáttmálin hjá Kongsborg gongur út í 2015 men við møguleika fyri at longja hann.*

**Sum skilst eru bæði Statoil og Skansi Offshore sera væl nøgd við samstarvið í Føroyum bæði undir teimum báðum boringunum og eisini ta tíðina Sjóborg hevur veitt tænastur í sambandi við umvælingararbeiðið á West Hercules pallinum.**

